# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**CITROEN SAXO 1.5D 3H**
Árg Jan'00, Km 64.500. Kr. 99.000 .



**CITROEN XSARA 1.6I 5H.**
Árg Jun.98, Km 30.000. Kr. 107.000 .



**CITROEN BERLINGO 1.9D**
Árg Sept'98, Km 81.000.
Kr. 109.000 .



**MITSUBISHI L300 2.0D VØRUV**
Árg feb'99, Km 161.000.
Kr. 85.000 .



**MAZDA DEMIO 1.3 5H**
Árg feb'99, Km 50.000.
Kr. 99.000 .



**CITROEN JUMPER CH.V/LAST 2.5TD**
Árg Aug.'98, Km 120.000.
Kr. 130.000 .



**CITROEN ZX 1.9D STC.**
Árg Mars'96, Km 89.000.
Kr. 86.000 .



**CITROEN XANTIA 1.9TD 5H**
Árg Feb-98, Km 60.000. Kr. 118.000 .



**MITSUBISHI GALANT 1.8GLSI**
Árg Jun'92, Km 150.000. Kr. 37.000 .



**MITSUBISHI LANCER 1.3I 4H**
Árg Aug.'98, Km 28.000.
Kr. 112.000 .



**NISSAN TERRANO 2.7TDI 3H**
Árg Nov'97, Km 71.000.
Kr. 133.000 .

**MITSUBISHI CARISMA 1.6GL 5H**
64.000 Km Kr. 105.000,



**CITROEN XSARA 2.0HDI 5H**
Árg Nov'99, Km 91.000.
Kr. 145.000 .



**CITROEN XANTIA 1.8I 5H**
Árg Oct-96, Km 63.000.
Kr. 112.000 .



**MITSUBISHI PAJERO 2.8GLS**
Árg Sept'98, Km 40.000.
Kr. 185.000 .

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo

## Lýsið har lýsingarnar síggjast

**Leys størv í Føroyum & uttanlands**



Fyritøkur og stovnar kunnu nú keypa pláss til starvslýsingar sínar á føroyska portalinum - www.portal.fo og í blaðnum Sosialinum

Føroyski Portalurin, ið er nýggja navnið fyri Olivant.fo hýsir starvslýsingum hjá fyritøkum og stovnum, sum hava áhuga í, at starvslýsingar teirra skulu røkka enn fleiri lesarum. Vanliga vitja upp í 10.000 brúkarar www.portal.fo hvønn dag.



Lýsingarprísur pr. starvslýsing, galdandi frá at lýsingin er løgd út á føroyska Portalin:

| | |
|---|---|
| 1 viku | kr. 1.000,- |
| 2 vikur | kr. 1.500,- |
| til freistin er úti | kr. 2.000,- |

Tekstur (word-fílur) og møguliga búmerki skal sendast viðheft til teldupostadressuna: lysing@sosialurin.fo

Eru spurningar og/ella ivamál, eru tit altíð vælkomin at senda teldupost til:

lysing@sosialurin.fo
ella ring til
Finnbjørg ella Anju
Sosialurin 311820



**MAZDA 626**
Árg apr. 88, Km 144.000.
Kr. 26.000.



**RENAULT MEGANE 1.4 H/B**
Árg jul. 97, Km 74.000. Kr. 89.000.



**FORD MONDEO 1.8**
Árg mei. 96, Km 62.000.
Kr. 98.000.



**FORD FIESTA 1.8 D**
Árg jan.96, Km 134.000.
Kr. 64.000.

**PEUGEOT 106**
Árg apr.96, Km 77.000. Kr. 69.000.



**NISSAN PRIMERA 2.0D SLX**
Árg jun.97, Km 145.000.
Kr. 99.000.



**HONDA ACCORD 2.0 I**
Árg des.99, Km 45.000.
Kr. 185.000.



**MAZDA DEMIO**
Árg feb.99, Km 54.000. Kr. 99.000.



**BMW 316 I**
Árg Mei-94, Km 122.000.
Kr. 114.000.



**SAAB 9-3 2.2TD**
Árg okt. 99, Km 33.000.
Kr. 196.000.

VOLVO RENAULT VR BILAR
Hoyvíksvegur
tel 322110



## BMW koyriskeið í 25 ár



Hjá BMW er tað ikki nokk at gera tryggar bilar við góðum koyrieginleikum, tí í síðsta enda er tað bilførarin sjálvur sum avger trygdina. Síðan teir byrjaðu, í 1977, eru nú professionell koyriskeið við 80 instruktørum í 13 ymiskum londum.

*Kelda: Tíðindaskriv frá BMW Group*

## Golf yvirhála Bobluna



Tann 25. juni í ár fór VW Golf nummar 21.517.415 av samlibandinum í Wolfsburg. Harvið fór Golfurin frammum framleiðslutalið á VW Type 1 (Bobluni), og er sostatt tann VW bilur, ið er farmleiddur í størst nøgdum nakrantíð

*Kelda: Bilpriser.dk*

## 30 ár við BMW-5



Nú eru liðin 30 ár síðan BMW 500 røðin kom á marknaðin. Fyrstu bilarnir komu av verksmiðjuni í München í 1972, sama ár sum olymisku leikirnir vóru har.

*Kelda: Tíðindaskriv frá BMW Group*

# Á framsýning við hvítum Rolls Royce

**Í døgunum frá 6. til 8. juni var ein framsýning á Tekniska Skúla í Havn. Har nakað av tí nýggjasta innan útgerð til bilverkstøð varð sýnt fram. Við sær høvdu framsýnararnir ein hvítan Rolls Royce sum reklamubil**

FRAMSÝNING
*Magnus Gunnarsson*

Starvsfólk á nógvum av bilverkstøðunum í landinum nýttu høvið at koma á eina framsýning á bildeildini á Tekniska Skúla, har tríggjar danskar fyritøkur sýndu fram tað nýggjasta innan útgerð til bilverkstøð. Car-O-Liner sýndu tað nýggjasta innan upprætting og mátiskipanir, BM Autoteknik høvdu framkomnar bremsutestarar og aðrar testskipanir og Stenhøj sýndu fram nýggjar og sera arbeiðsligar lyftarar, kompressarar og aðra útgerð.



*Manningin á framsýningini saman við hvíta Rolls Royce`inum.Teir eru frá vinstru: Frede Larsen, sølumaður hjá Stenhøj, Kent Reinhold, sølustjóri hjá Stenhøj, Martin Larsen, sølustjóri hjá BM Autoteknik, Ronie Petersen, serviceteknikkari hjá Car-O-Liner og Barry Brændstrup konsulentur hjá Stenhøj*



*Rolls Royce frá 1962. Bilurin tók seg væl út á føroysku vegunum*

Framsýnararnir hjá Stenhøj, ið er størsti framleiðari av t.d. bil-lyftarum, kompressarum og øðrum til bilverskstøð og ídnaðin í Norðanlondum, høvdu ein hvítan Rolls Royce frá 1962 við sær. Bilurin, ið er hvítur allur sum hann er, bæði uttan og innan, bleiv keyptur fyri umleið 5 árum síðan frá einum donskum tónleikabólki. Stenhøj brúka bilin sum reklamubil. Onkur minnist kanska at bilurin eisini var í Føroyum fyri tveimum árum síðan.

# Tíðindaskrivið Ellisakfør í leysasølu á Shellstøðunum

*Her er fyrsti bilurin, ið kom í Sandoynna í 1923, tá hevði verið vegur millum Skopun og Sand í nøkur ár*



**Tíðindaskrivið Ellisakfør er nú aftur at fáa á Shellstøðunum kring landið. Í blaðnum hesaferð eru nógvar greinar og áhugaverdar myndir. Blaðið er merkt av, at tað eru liðin 80 ár, síðan fyrsti bilurin kom til landið í 1922**

ELLISAKFØR
*Magnus Gunnarsson*

Í blaðnum hesaferð kunnu vit t.d.lesa um hví fyrrverandi danski forsætisráðharrin, Anker Jørgensen, ikki vildi koyra í Mercedes, um nýggju nevndina í Føroya Ellisakførum og um ein rundan føðingardag á Argjum. Eisini er ein sera áhugaverd grein hjá Palla Dalsgaard í Skálavík, har hann sigur frá um fyrsta bilin, ið kom í Sandoynna í 1923. Hann hevur tosað við fleiri eldri fólk í Sandoynni.



*Palli Dalsgaard í Skálavík skrivar um fyrsta bilin í Sandoynni, og aðrar hendingar ið hava við bilar at gera*